# Havnar Telvingarfelag føroyameistarar

**Við sigri á kollfirðingum avgjørdu havnarmenn sjálvir FM-heitið, sum teir eisini vunnu í fjør, og næsta kappingarár umboðar Havnar Telvingarfelag tvey lið í 1. deild eftirsum 2. deild eisini bleiv vunnin av Havnini.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Havnar Telvingarfelag vann kappingina í fyrstu deild. Frá vinstru eru tað Haldur S. Johansen, Herluf Hansen, Olaf Berg, Andrias Ziska og Suni Merkistein*

*Myndir frá FM: Sveinur Thomassen*

Stásiliga bygdarhúsið í Hósvík varð karmur um seinasta umfar í liðkappingini. Hesi seinastu árini hava allar deildirnar telvað seinasta umfar undir somu lon, og hevur hetta eisini verið til frama fyri spenningi og hugna.

## Hildu høvdið kalt

Tað er altíð torført at skula telva avgerandi dystir, og júst hetta var dagskráin hjá fimm av liðunum í fremstu deild. Sandavágsmenn vóru undan dystinum ímóti hvalvíkingum vísir í niðurflyting.

Serliga var nógv trýst á havnarliðnum, sum vóru tvey stig fremstir. Teir hittu kollfirðingar sum heldur óvæntað høvdu ongan stórmeistara á liðnum.

Haldur Suni Johansen og Hans Kristian Simonsen leiktu varliga á fyrsta borði, og tóku javnt í jøvnum rókaendatalvi. Haldur Suni telvaði sera varliga, hann hevði helst ongan hug at seta FM-heitið í vanda. Haldur Suni hevur eins og Herluf havt eina góða seinnu helvt. Hans kristian fekk sítt gjøgnumbrot í ár, og serliga talvið ímóti John Rødgaard sum hann vann prógvar júst gjøgnumbrotið.

Herluf Hansen sum í fjør var toppskorari í liðkappingini hevur ikki verið heppin í ár. Men í seinnu helvt hevur eydna tó follin í hansara lut og varð hann sostatt mettur favorittur ímóti Berhard Thomsen. Herluf fekk eisini betri støðu í byrjanarspælinum, men sum hann sjálvur sigur so varð hann ótolin tá hann fór í eitt óneyvnt álop. Bernhard vann talvið eftir at Herluf møguliga átti at fingið javnleikin í skjáttuna.

Olaf Berg hevur telva heilt væl í seinnu helvt, og vann hann eisini leygardagin sítt talv ímóti Karl L. Johansen. Olaf vann sær tvær finnur, og avviklaði til eitt vunnið endatalv. Olaf hevur verið álitið í ár hjá havnarmonnum, og heldur hann fram á hendan hátt verður hann uttan iva heilt skjótt at síggja í føroysku talvelituni.

Fyrrverandi føroymeistarin Andrias Ziska hevur telvað fýra talv í ár fyri havnarmenn, og hevur hann vunnið øll hesi. Sera flott tá hugsað verður um at hann hevur havt eina fimm ára talvhvíld. Hann vann eitt heldur óklárt talv ímóti Alvin Joensen á fjórða borði.

2,5-1,5 sigur til Havnina og endaðu teir sostatt kappingina við sigri. Eitt skifti lógu teir aftast, men við einum blandingi av sterkum vilja og hjálp frá útisetanum Flóvin Tór Næs, vendist gongdin og skjótt lógu teir fremstir. Hetta má sigast at vera ein flottur endaspurtur hjá havnarmonnum.

Ikki færri enn níggju mans hava umboða vinnandi liðið hjá Havnini, og hesir vóru Flóvin Tór Næs 1,5 stig av 3 møguligum, Haldur S. Johansen 3/7, Herluf Hansen 3_/10, Olaf Berg 6,5/9, Suni Merkistein 2/3, Andrias Ziska 4/4, Jóhan E. Hansen 2/2, Luitjen Apol _/1 og Súni Ziska _/1.

## Rani vann á Rødgaard

Hjá bæði vestmenningum og klaksvíkingum var bara eitt at gera, nevnliga at vinna stórsigur. Hvørgin fekk stórsigur, men klaksíkingar vunnu hinvegin ein tepran 2,5-1,5 sigur.

Rani Nolsøe og John Rødgaard hittust á fyrsta borði. John hevði svarta fólkið og svaraði sum vant e4 við fronsku byrjanini, e6. Rani telvaði ágangandi, var kanska eitt sindur óvarin. Rødgaard fekk góða støðu, men var óansin og tapti. Talvið teirra millum er talvið hesa vikuna.

Steintór Rasmussen hevur havt ein sera góð kapping, har hann einki hevur tapt. Eitt nú javnleikurin ímóti IM Leif Kristensen var flottur. Fyrra talvið ímóti Torbjørn Thomsen endaði javnt, og bleiv eisini hetta úrslitið í talvinum teirra millum leygardagin. Teir telvaðu ein ópresisan sisilianara, har Torbjørn fekk fyrimun. Men eins og í fyrra talvinum skiftust teir um fyrimunin, og javnleikur varð loksins úrslitið. Torbjørn var álitið hjá vestmenningum í ár, hann tapti heldur einki talv í ár.

Tummas Martin Anthoniussen vann aftur, eftir at hava tapt trý tey seinastu talvini. Hann vann á John Jacobsen. John hevði annars allar møguleikar í byrjanarspælinum, men tók ongan av hesum og tá vendist gongdin, og Tummas Martin vann sannførandi. Sum heild fekk Tummas eitt gott úrslit, 6,5 av tíggju og nógva rating

Útisetarnir Finnbjørn Vang og Terji Petersen vóru heima og hjálpti ávíkavist fyrsta - og øðrum liði hjá klaksvíkingum. Finnbjørn mátti tó taka til takkar við einum tapi ímóti Petur Højgaard. Finnbjørn leikti ein feil tíðliga í talvinum sum viðførdi at Petur fekk øgiligt sentrum og vann tá trygt.

Ein góður sigur hjá klaksvíkingum, men alt ov lítil tá FM-heitið viðvíkur. Vestmenningar vóru mettir sum favorittar undan kappingarbyrjan, men endaðu á fjórða plássi, javnir við klaksvíkingar, men vunnu færri dystir enn teir har norðuri.

## Annað pláss til hvalvíkingar

Við tryggum 3-1 sigri á niðurflytararnum úr Sandavági, endaðu hvalvíkingar á einum heiðurligum øðrum plássi. Teir hava havt nærum somu manning hvørt umfar, nakað sum hini feløgini ikki hava megna serliga væl. Hjá sandavágsmonnum varð bert heiðurin at stríðast fyri. Teir kunnu tó ikki vera heilt ónøgdir við teimum fimtan stigunum teir fingu.

Torkil Nielsen, sum hevur havt eina hampuliga góða kapping, fekk einasta stig í dystinum hjá sandavágsmonnum, tá hann vann á Martin Brekká. Martin kann heldur ikki vera skuffaður yvir síni úrslit í ár.

Gutti Petersen hevur fingið ótrúlig úrslit í ár við eitt nú javnleikinum ímóti John Rødgaard, men ímóti Finnbjørn Zachariassen bleiv uppgávan ov stór, og tapti hann tískil.

Sámal Christiansen og Gunnar Joensen á triðja og fjórða borði vunnu somuleiðis á ávíkavist Hera Christoffersen og Sonna Nielsen.

Kappingin í ár hevur verið merkt av at liðini hava verið óstøðug, summi meira enn onnur. Hinvegin hevur tað eisini viðført at sera javnt hevur verið, har heili fimm lið kundu enda ovast undan seinasta umfari.

Myndir av felagsumfarinum í Hósvík eru at síggja á www.faroechess.com

## 2. deild

Havnin 2 lá alt kappingarárið í toppinum og hesi seinastu umfarini hava teir ligið trygt á odda. Teir lógu hálvtannað stig fremstir undan dystinum ímóti Klaksvík, og vunnu hendan dyst og endaðu teir tískil loksins fremstir.

Lógin sigur at loyvt er at hava í mesta lagið tvey lið úr sama felagið í somu deild, og hetta viðførir tí at Havnin hevur tvey lið í fyrstu deild næsta kappingarár. Klaksvíkingar og kollfirðingar hava roynt hetta fyrr uttan succes, og spennandi verður at siggja hvussu havnarmenn megna hesa uppgávu.

Toftamenn taptu ímóti gøtumonnum, men endaðu kortini á øðrum plássi. Gøta bleiv nummar trý. Runavík við Ólavi Simonsen á liðnum endaðu heldur óvæntað á einum fjórða plássi, meðan Havnin 3 var hálvtriðja stig aftanfyri Klaksvík, og mugu tí telva í 3 deild næsta ár.



*Havnar talvfealg vann eisini kappingina í aðru deild. Frá vinstru eru tað Rani Nolsøe (TSF forma?ur) Michael Jensen, Jógvan Næs, Jóhan Gaard, Suni M og Jóannes Guttesen, sum eisini er HT formaður*

## Vestmenningar ovastir

Vestmenningar høvdu eitt sterkt triðju deildarlið, og teir vunnu eisini deildina framanfyri Havnina, sum annars nógv tey seinastu árini hevur vunnið deildina. Vestmanna 2 taptu seinasta dystin, men vestmanna 3 bjargaði betra liðið úr Vestmanna við at leika 2-2 ímóti havnini.

Klaksvíkingar blivu trygt føroyameistarar í unglingadeildini og Havnin bleiv nummar tvey.

Í FM-liðkappingini fyri børn undir sekstan ár, vann Havnin framanfyri klaksvíkingar, Gøtu og Toftir.



*John Rødgaard og Rani Nolsøe telvaðu eitt sera áhugavert talv, sum vit eisini hava valt sum talvið hesa vikuna*






*Nógv stóð á telvarunum, tá seinasta umfarið í FM kappingini var á skránni um vikuskiftið*

## 1. Deild

**HT-KT 2.5-1.5**

| | |
|---|---|
| 1. Haldur S. Johansen (2030) - Hans K. Simonsen (1785) | 0.5-0.5 |
| 2. Herluf Hansen (2020) - Bernhard Thomsen (2015) | 0-1 |
| 3. Olaf Berg (1815) - Karl L. Johansen (1720) | 1-0 |
| 4. Andrias Ziska (1970) - Alvin Joensen (1600) | 1-0 |

**TFS-ST 3-1**

| | |
|---|---|
| 1. Martin Brekká (2070) - Torkil Nielsen (2055) | 0-1 |
| 2. Finnbjørn Zachariasen (2045) - Gutti Petersen (1575) | 1-0 |
| 3. Sámal Christiansen (1845) - Heri Christoffersen (1630) | 1-0 |
| 4. Gunnar Joensen (1845) - Sonni Nielsen (1745) | 1-0 |

**VT-KTF 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. IM John Rødgaard (2335) - Rani Nolsøe (2170) | 0-1 |
| 2. Torbjørn Thomsen (2220) - Steintór Rasmussen (2055) | 0.5-0.5 |
| 3. John Jacobsen (1915) - Tummas M. Anthoniussen (1900) | 0-1 |
| 4. Dánjal P. Højgaaard (1840) - Finnbjørn Vang (1845) | 1-0 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1. HT, Tórshavn | 6-3-1 | 23,5 |
| 2. TFS, Hvalvík | 4-2-4 | 21,0 |
| 3. KTF, Klaksvík | 4-2-4 | 20,5 |
| 4. VT, Vestmanna | 3-3-4 | 20,5 |
| 5. KT, Kollafjørður | 4-2-4 | 19,5 |
| 6. ST, Sandavágur | 1-4-5 | 15,0 |

## 2. Deild

**HT 3-RT 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. Sigurð Justinussen (1705) - Ólavur Simonsen (2200) | 0-1 |
| 2. Jeffri Justinussen (1715) - Brandur Jacobsen (1710) | 0.5-0.5 |
| 3. Jón Andreasen (1635) - Eyðun Lamhauge (1610) | 0-1 |
| 4. Jóannes Guttesen (1505) - Dánjal P. Jensen | 1-0 |

**KTF 2-HT 2 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. Terji Petersen (2080) - Suni Merkistein (1980) | 1-0 |
| 2. Petur H. Poulsen (1830) - Jóhan Gaard (1820) | 0-1 |
| 3. Esbern Christiansen (1605) - Michael Jensen (1800) | 0-1 |
| 4. Egil Finnson - Jógvan Næs (1680) | 0.5-0.5 |

**TT-GT 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. Jens K. Hansen (2140) - Jónfinn Thomsen (1850) | 1-0 |
| 2. Helgi Joensen (1735) - John Joensen (1725) | 0-1 |
| 3. Wenzil Højgaard (1735) - Reinhold Isaksen (1725) | 0.5-0.5 |
| 4. Justines Hansen (1680) - Jákup F. Joensen (1690) | 0-1 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1. HT | 2 9-1-0 | 26,0 |
| 2. TT | 6-1-3 | 23,5 |
| 3. GT | 4-0-6 | 21,0 |
| 4. RT | 5-0-5 | 20,0 |
| 5. KTF | 2 3-0-7 | 16,0 |
| 6. HT | 3 2-0-8 | 13,5 |

## 3. Deild

**VT 2-Rókur 1.5-2.5**

| | |
|---|---|
| 1. Kári O. Durhuus (1770) - Petur Sumberg (1635) | 0-1 |
| 2. Jón Mikkelsen (1665) - Árni M. Dam | 1-0 |
| 3. Jákup á R. Andreasen (1640) - Karl M.S. Jensen (1240) | 0-1 |
| 4. Jákup Durhuus (1630) - Bergur Johannesen (1330) | 0.5-0.5 |

**KTF 3-KT 2 1-1**

| | |
|---|---|
| 1. Vagn Heldarskarð (1470) - Hans J. Petersen (1805) | 0-1 |
| 2. Jan Simonsen (1315) - Árant Djurhuus (1000) | 1-0 |
| 3. møtti ikki - møtti ikki | 0-0 |
| 4. møtti ikki - møtti ikki | 0-0 |

**HT 4-VT 3 2-2**

| | |
|---|---|
| 1. Suni Jacobsen (1675) - Joen P. Johannesen (1475) | 1-0 |
| 2. Frants Eliassen (1420) - Niels O. Durhuus (1390) | 1-0 |
| 3. Herfinn Seloy (1120) - Virgar Hansen | 0-1 |
| 4. Arnbjørn Dalsgarð - Hanus I. Hansen (1195) | 0-1 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1. VT | 2 7-0-3 | 28,0 |
| 2. HT | 4 7-2-1 | 26,5 |
| 3. KT | 2 5-1-4 | 23,0 |
| 4. VT | 3 3-2-5 | 15,0 |
| 5. Rókur | 3-0-7 | 13,0 |
| 6. KTF | 3 2-1-7 | 12,5 |

## Unglingar

**HT 2-KTF 2-2**

| | |
|---|---|
| 1. Bjørgvin Lenvig - Ingolf Gaard (1770) | 0-1 |
| 2. Tróndur Olsson - Atli Jacobsen (1290) | 0-1 |
| 3. Andri Lenvig - møtti ikki | 1-0 |
| 4. Pætur Johannesen - Danny Tómasson | 1-0 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1. KTF | 2-2-0 | 12,0 |
| 2. HT | 1 2-0-2 | 7,5 |
| 3. HT | 2 0-2-2 | 4,5 |
| 4. KT | 0-0-0 | 0,0 |

## Dreingir

**GT - TT 3-1**

| | |
|---|---|
| 1. Jóhan Eliasen - Andrias W. Danielsen | 1-0 |
| 2. Sam Jacobsen - Clæmint Clementsen | 1-0 |
| 3. Heri Thomsen - Petur M. Magnussen | 1-0 |
| 4. Dia Guttesen - Jóan S. Edmundson | 0-1 |

**HT - KTF 2.5-1.5**

| | |
|---|---|
| 1. Jákup D. Joensen - Rani Tómasson | 0.5-0.5 |
| 2. Rasmus Johannesen - Ebbe Petersen | 1-0 |
| 3. Fríbjartur Olsen - Rógvi Dragaberg | 0-1 |
| 4. Rógvi Mortensen - Berint Kalsø | 1-0 |

**TT - KTF 0-4**

| | |
|---|---|
| 1. Andrias W. Danielsen - Rani Tómasson | 0-1 |
| 2. Clæmint Clementsen - Ebbe Petersen | 0-1 |
| 3. Petur M. Magnussen - Rógvi Dragaberg | 0-1 |
| 4. Jóan S. Edmundson - Berint Kalsø | 0-1 |

**GT - HT 0-4**

| | |
|---|---|
| 1. Jóhan Eliasen - Jákup D. Joensen | 0-1 |
| 2. Sam Jacobsen - Rasmus Johannesen | 0-1 |
| 3. Heri Thomsen - Fríbjartur Olsen | 0-1 |
| 4. Benjamin Hansen - Rógvi Mortensen | 0-1 |

**KTF - GT 1-3**

| | |
|---|---|
| 1. Rani Tómasson - Jóhan Eliasen | 1-0 |
| 2. Ebbe Petersen - Sam Jacobsen | 0-1 |
| 3. Rógvi Dragaberg - Dia Guttesen | 1-0 |
| 4. Berint Kalsø - Benjamin Hansen | 1-0 |

**TT - HT 0-4**

| | |
|---|---|
| 1. Andrias W. Danielsen - Jákup D. Joensen | 0-1 |
| 2. Clæmint Clementsen - Rasmus Johannesen | 0-1 |
| 3. Petur M. Magnussen - Fríbjartur D. Olsen | 0-1 |
| 4. Jóan S. Edmundson - Rógvi Mortensen | 0-1 |

**Endaliga støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1. HT | 3-0-0 | 10,5 |
| 2. KTF | 2-0-1 | 8,5 |
| 3. GT | 1-0-2 | 4,0 |
| 4. TT | 0-0-3 | 1,0 |

## Talvið hesa vikuna

**Rani Nolsøe 2170 - IM John Rødgaard 2335
FM Liðkappingin (10), 03.03.2001**

1.e4 e6 Fronsk byrjan 2.d4 d5 3.Nc3 Bb4 4.e5 Ne7 5.a3 Bxc3+ 6.bxc3 c5 7.h4!? Qc7 8.Rh3 b6 9.h5 h6 10.a4 Rani kennir seg hava tíð at útseta útviklingina 10...Ba6 11.Bd2 Bxf1 12.Kxf1 Nbc6 13.Qg4 Rg8 14.Qf4 Na5 Rødgaard hevur gott spæl frúgvamegni, og stendur nakað betur 15.Ne2 Rc8 16.g4 cxd4 17.Rf3 Nec6 [17...Nc4! 18.cxd4 (18.Qxf7+ Kd7 og svartur vinnur) 18...Nxd2+ og Rani missur c-finnuna] 18.cxd4 Nc4 19.g5 hxg5 20.Qxg5 Qe7 21.c3 Qxg5 22.Bxg5 Rh8 23.Ng3 N6a5 Ne7 var eisini ein møguleiki, tann trygga loysnin 24.Ke2 Rc7 25.h6 gxh6 26.Rh1 Nb2 27.Nh5 einasti leikur sum kann brúkast hjá Rana 27...Kd7 28.Rxf7+ Kc8 29.Rxc7+ Kxc7 30.Bf6 Rh7 Rani hevur nú fyrimun, eftir at hava staðið verri 31.Ra1 Nc6 32.Kf3 Nc4 33.Kg4 [33.Bg7 betri] 33...Ne7 34.Nf4 Kd7 35.Kh5 Nd2? [35...Rf7 einasti leikur, sum eisini kundi givið svørtum remiskjansir]



36.Ng6! nú vinnur hvítur, riddarin hóttir eisini skák á f8 36...Rf7?! [36...Nxg6 37.Kxg6 Re7 38.Bxe7 tapir sjálvsagt eisini, men at missa býtismun er betri enn at geva mann] 37.Nxe7 Ne4 38.Ng6 Nxf6+ 39.exf6 Rxf6 40.Ne5+ Kd6 41.f3 Rf8 42.Rg1 Rc8 43.Rg7 Rc7 44.Rxc7 Kxc7 45.Kxh6 a5 46.Nd3 b5 47.Kg5 bxa4 48.Kf6 a3 49.Nc1 Kd6 50.Na2 Kc6 51.Kxe6 Kb5 52.Kxd5 Ka4 53.Nc1 og Rødgaard gavst 1-0

# Kasparov vinnur Linares

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Gary Kasparov prógvar veruliga í Linares hví hann enn er mettur sum heimsins besti telvari. Hann hevur nevnliga undan tveimum teimum seinastu umførunum seks stig av átta møguligum. Judit Polgar kemur næst í røðini, men bert við fýra stigum. Kasparov skal tí bert hava hálvt stig av tveimum, og hesir mótstøðumenn verða Karpov og Grischuk. Shirov, Karpov og Leko liggja allir á deildum fjórða og aftasta plássi við hálvumfjórða stigi.

Sunnudagin vann Kasparov á Shirov, Karpov vann á Polgar, hansara fyrsta í kappingini, og Leko og Grischuk leiktu javnt.